**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Lærarastørv í Fólkaskúlanum

Í fólkaskúlanum eru niðanfyri nevndu lærara størv leys at søkja til setanar **1. august 2002.**

**Norðoya skúladømi I:** Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar kommunur
Klaksvíkar kommuna:
*Skúlin á Ziskatrøð* 1 lærari
Viðareiðis kommuna: 1 lærari

**Norðoya skúladømi II:** Mikladals og Húsa kommunur
Mikladals kommuna: 1 einalærari

**Eysturoyar skúladømi II:** Skála, Sjóvar, Oyndarfjarðar, Runavíkar og Nes kommunur
Runavíkar kommuna: 1 lærari
Nes kommuna: 1 lærari

**Streymoyar skúladømi I:** Vestmanna og Kvívíkar kommunur
Vestmanna kommuna: 4 lærarar

**Streymoyar skúladømi III:** Tórshavnar, Nólsoyar og Kirkjubøar kommunur
Tórshavnar kommuna:
*Kommunuskúlin* 1 lærari
*Hoyvíkar skúli* 1 lærari
*Argja skúli* 1 lærari
Kirkjubøar kommuna: 1 lærari

**Vága skúldømi:** Miðvágs-Sandavágs , Sørvágs og Bíggjar kommunur
Miðvágs-Sandavágs kommunur: 2 lærarar

**Sandoyar skúladømi:** Húsavíkar, Sands, Skálavíkar og Skopunar kommunur
*Sandoyar Meginskúli* 1 lærari

Øll størvini eru roknað við fullum tímatali.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal vera Mentamálastýrinum í hendi **í seinasta lagi hósdagin 6. juni 2002.** Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av prógvbrævi og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri skúlum, skulu skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara.

**Tórshavn, 22. mai 2002**

**Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 - Fax 355055 - e-postur: MMS@MMS.fo**

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Læknaskrivari

Eitt fulltíðarstarv sum læknaskrivari er leyst til setan frá 1. juli 2002. Møguleiki er eisini fyri parttíðarstarvi.

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitum umfatar starvið skrivarauppgávur fyri læknarnar, herundir sjúklingaskráseting og skjalasavn.

**Førleikakrøv**
Tað er eitt krav, at tann, ið settur verður, hevur lokið prógv sum læknaskrivari. Tað er somuleiðis ein fyrimunur, at viðkomandi hevur kunnleika til edv.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Herfríð Petersen, læknaskrivara, tlf. 371133 lokal 122.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

í seinasta lagi 10. juni 2002.

# LFA
## Landsfelagið fyri Autistar

**Skeið fyri foreldur, hjá smærri autistiskum børnum, á Hotel Norð á Viðareiði**

Í sambandi við, at Lennart Pedersen, neuropsykologur, kemur til Føroya, skipar Autistafelagið fyri skeiði á Hotel Norð á Viðareiði, fyri foreldur og avvarandi.

Lennart Pedersen er serfrøðingur og granskari í autismu og starvast á sentrinum fyri Autismu í Bagsværd í Danmark.

Skeiðið verður hildið sum eitt »Internatskeið«, og kunnu tað verða 20 luttakarar við. Byrja verður mikukvøldið 5. juni og hildið á til og við fríggjadagin 7. juni. Tað er ein fínur møguleiki at hitta onnur foreldur, sum eru í somu støðu sum tú sjálvur.

***Møguleiki er hjá foreldrum og støkum luttakarum at fáa fíggjarligan stuðul.***

Skráin fyri skeiðið er gjørd í samráð við foreldur og Lennart Pedersen.

Luttakaratalið er avmarkað til 20 persónar og seinasta freist at tekna seg er fríggjadagin 31. mai 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til tlf. 455213 ella tlf. 310255 (Best aftaná kl. 18.00).

**Autistafelagið**



# SØVNINI Í SUMMAR

**Í summar verður opið soleiðis:**

**Føroya Fornminnissavn** **tlf. 318076**
*Framsýningarnar í Brekkutúni 6*
*og Heima á Garði, Hoyvík:*
Í tíðarskeiðinum 20. mai – 15. september:
Mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 17.00
Leygar- og sunnudag kl. 14.00 – 17.00
**Avgreiðslan:** **tlf. 310700**
Kúrdalsvegur 2, Hoyvík
Mánadag – fríggjadag kl. 09.00 – 12.00
& kl. 13.00 – 15.00

**Føroya Náttúrugripasavn** **tlf. 312306**
*Framsýningarnar á Debesartrøð:*
Í tíðarskeiðinum 1. juni – 31. august:
Mánadag – fríggjadag kl. 11.00 – 16.00
Leygar- og sunnudag kl. 15.00 – 17.00

**Føroya Landsskjalasavn** **tlf. 316677**
Í tíðarskeiðinum 1. juni – 31. august:
*er lesistovan opin:*
Mánadag, týsdag, hósdag
og fríggjadag kl. 11.00 – 16.00
Mikudag og leygardag stongt

**Føroya Landsbókasavn** **tlf. 311626**
Í tíðarskeiðinum 17. juni – 16. august:
Mánadag – fríggjadag kl. 13.00 – 17.00

**Býarbókasavnið** **tlf. 313626**
hevur opið sum vant:
Mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 18.00
Leygardag kl. 10.00 – 13.00

**Listasavn Føroya** **tlf. 313579**
Í tíðarskeiðnum 1. juni – 1. september:
Mánadag – fríggjadag kl. 11.00 – 17.00
Leygar- og sunnudag kl. 14.00 – 18.00

*Tórshavn, 24. mai 2002*

**Søvnini**

**Grannskoðaravirkið Højmose, FRR**
v/ Børge Christiansen, Cand.merc.aud
Reg. revisor
Í Heiðum • 370 Miðvágur
Tlf. 333498 • telefax 333490
E-mail: hoejmose@post.olivant.fo
http://www.rev-hoejmose.dk

**Rengøringsassistent – deltid**
Jeg har brug for en person til at gøre rent 1 – 2 timer om ugen fra juni til august. Det kan godt være en studerende.

# Fólk søkist

Vit søknast eftir fólki sum feriuavloysara evt. fast starv/lærupláss.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**optikbúdin**

**BESTA MÁLINGIN TIL HÚSIÐ**
**máling & gólv**
**JOHNSTONE'S TRÆVERJA**
SERA HALDGÓÐ
Tolir væl okkara harðføra veðurlag
5 l. 399 kr.
**STORMSHIELD BETON MÁLING**
Royndir vísa hon heldur í 15 ár
10 l. 549 kr.
**máling & gólv**
við Landavegin
Tlf. 316066

**MEKANISKA VERKSTAÐIÐ**
er stongt vegna skeiðvirksemi
frá mánadegnum 27/5 til og við hósdagin 30/5

Hinar deildirnar hava opið sum vanligt

**REYNI SERVICE**




tlf 35 30 40 · fax 35 30 41

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Vikarar
**til Hvalbiar Skúla**

Søkt verður eftir vikarum til Hvalbiar skúla skúlaárið 2002/2003.

Eitt fulltíðarstarv, fyri lærara í farloyvi.

Eitt parttíðarstarv, við uml. 19 tímum um vikuna.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2002/2003, verða lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkinum 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu verða Hvalbiar Skúlastýrið í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

**Hvalbiar Skúlastýrið**
Att.: Róin Schrøterbí
850 Hvalba

**Krana og lastvognskoyring**
**Upp til 5 tons.**
Henning Thomsen (y)
Grótlaðari Tlf. 316739 - 283639

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin

# Sjúkrasystrar

Á deild A – kirurgisk songjardeild eru hesi avloysarastørv leys at søkja:

1 sjúkrasystir at arbeiða 1,0 tíð frá 01.07.02 til 30.09.02
1 sjúkrasystir at arbeiða 1,0 tíð frá 01.08.02 til 31.01.03

í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- Fakligan áhuga innan kirurgiska sjúkrarøkt
- Góð samstarvsevnir

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Onnu Løwe Sørensen, deildarsjúkrasystir tlf. 455463 lok. 519 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lok. 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Umsjónarmannin**
Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 17. juni 2002 kl. 15.00.